# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Prógv**
25 sep. bleiv Heini Dalberg Simonsen, Tórshavn, útlærdur sum prentari hjá Einars Prent.

8. juni 2007 hevur Sunniva Joensen, Saltangará, lokið prógv sum løgfrøðingur (cand. jur.) við lærda Háskúlan í Keypmannahavn.

**70 ár**
28. september verður Johanna Lave, Froðba, 70 ár. Hon er burturstødd.

**80 ár**
Leygardagin 29. september fyllir Minny Jacobsen, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin frá kl. 16 hjá døttrini á Lauritsargøtu 7 Tórshavn. Øll eru vælkomin.

**90 ár**
Sunnudagin 30. september verður Svanhild Zachariasen, Tórshavn, ættað úr Hósvík, 90 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá Svanhild eru vælkomin á Lágarveg 28 millum kl. 13 og 18.

**60 ár**
29. september heldur Thomina Svøðstein, Klaksvík, 60 ára føðingardag. Opið hús verður frá kl. 17.00 í húsmøðrafelagnum í Bøgøtu 3. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**65 ár**
10. august fylti Jonhild Bech, Porkeri 65 ár og 29. september fyllir maðurin Zacharias Bech 65 ár. Føðingardagarnir verða hildnir í skúlanum í Porkeri leygarkvøldið 29. september frá kl. 18.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føðingar**
4. september fingu Sylvia Hansen og Niels Vilhelmsen, Hvidovre, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 2935 gr.

14. september fingu Annika Helgadóttir Davidsen og Kári Davidsen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3370 gr.

19. september fingu Gunnvør Fríðhild Juul og Jógvan Olivur Kallsoy, Eiði, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4100 gr.

20. september fingu Anna og Brynjálvur Dalsgaard, Sandur, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3800 gr.

21. september fingu Eyðrit Gøthe og Jacob Martin Jacobsen, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3550 gr.

21. september fingu Anna Maria og Heini Ellingsgaard, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4700 gr.

22. september fingu Ingibjørg og Niels Winther, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4700 gr.

22. september fingu Elisabeth og Jón Thomasen, Kvívík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3900 gr.



21. sept fingu Marita og Jakob Eckhardt Tróndheim, Brønderlev, ein son. Hann vigaði 3820 gr og var 55 cm langur.

22. september fingu Sølvá og Jóhan Vest, Oyndarfjørður, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3450 gr.

24. september fingu Oddbjørg og Johnhard Klettheyggj, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3950 gr.

25. september fingu Anna Petra Poulsen og Christian Eli Zachariasen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3825 gr.

26. september fingu Jenny og Jóhan Danielsen, Lamba, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3550 gr.

**Brúdleyp**
Leygardagin 29. september kl. 10 giftast í Vesturkirkjuni Ragnhild Guðjónsson og Jákup Mørk úr Havn. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum frá kl. 13 til 18.

Leygardagin 29. september kl. 17.00 giftast í Nólsoyar Kirkju Nicolaj Falck, Nólsoy og Sonja Herietsdóttir, Vestmanna. Aftaná vígsluna er vælkomst í Royndarhúsinum í Nólsoy.

Leygardagin 29. sept. kl. 11.00 giftast í Elim í Søldarfirði Jytta Sundstein Olsen, Søldarfjørður og Poul Johannes Nielsen, Saltangará. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 15.00.

Leygardagin 29. september kl. 15.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Kristfríð Asbjørnsdóttur Justesen, Tórshavn og Símun Jóhannus Mikkelsen, Fuglafjørður. Eftir vígsluna verður kaffi í kirkjukjallaranum. Veitslan verður fyri innboðin á Hotel Føroyum.

Leygardagin 29. september kl 15.00 giftast í Vágs Kirkju Majken Sandá og Julius Vest Joensen, Vágur. Brúdleypið verður fyri innbodnum á Hotel Bakkanum.



20/9-07 fekk Vár eina systur, sum var 55 long og vigaði 3850 gr og hon eitur Vón. Foreldrini eru Eva Eliassen og Ansgar Nolsøe



25. september fingu Margreta og Óli Hammer, Eiði, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3300 gr.

# Judy Jacobsen 60 ár



Sunnudagin 30. september verður Judy Jacobsen 60 ár. Hon býr í Florida saman við føroyska manni sínum, Óla á Grømma Jacobsen. Hóast hon hevur týskar røtur, og er fødd og uppvaksin í USA, so eru tað nógvir føroyingar, sum komast við og kenna fryntliga og fyrikomandi føðingardagsbarnið, sum á sín serliga hátt hevur knýtt seg at Føroyum og føroyingum, og sum føroyingar hava tikið til sín.

Foreldrini hjá Judy vóru týskarar. Hóast tað eru mong ár síðani, at tey fluttu úr heimlandinum, so hevur Judy gott samband við familjuna í Týsklandi, har hon framvegis eigur 21 systkinabørn á lívi.

Mamman, Ann, sum var 87 ára gomul, tá ið hon doyði í 2002, var ættað úr Harburg, sum er partur av Hamburg. Hon var trettan ára gomul, tá ið hon saman við foreldrunum flutti til USA. Pápi hennara var múrari og mamman húsmóðir.

Pápin, Otto Mueller, var ættaður úr Gödenstorf, sum er lítil býur einar 50 kilometrar sunnanfyri Hamburg. Pápi hansara var bóndi, og stórur partur av familjuni hevur fingist við bóndaskap. Otto var 19 ára gamal, tá ið hann einsamallur flutti til USA. Hann var 94, tá ið hann doyði í 2002.

Ann og Otto møttust í Milwaukee í Wisconsin, og tey vóru gift í 67 ár. Ann var heimagangandi, inntil døtrarnar vóru stórar. Síðani arbeiddi hon sum húshjálp. Otto helt amboð við líka á stórari verksmiðju í Milwaukee, inntil hann var farin um tey áttati. Tey fingu tvær døtrar. Dorothy Holmquist, sum er átta ár eldri enn Judy, er gift manni av svenskari ætt, og so Judy.

Systurin var trúboðari í Brasil, tá ið Judy – eftir at vera liðug í skúlanum í Milwaukee í Wisconsin - vitjaði hana. Eftir ta ferðina fór hon á bíbliuskúla hjá New Tribes Mission í Waukesha í Wisconsin. Har hitti hon Óla á Grømma Jacobsen. Tey giftust í januar 1968, og síðani hava tey arbeitt í trúboðanarfelags skapinum. Fyrstu seks árini undirvísti Judy, sum tosar týskt raðið, í sponskum og portugisiskum, og síðani hevur hon arbeitt saman við manninum innan leiðslu í NTM, bæði í Filipsoyggjunum í tíggju ár og í Florida, har NTM hevur høvuðssæti.

Judy er nágreinilig, nærløgd og miðvís, og hon er framúr innan umsiting. Óli hevur ongantíð fjalt yvir, at tað hevði ikki borið til hjá honum at røkt leiðsluuppgávurnar, sum honum hava verið litnar upp í hendi, um hann ikki hevði havt Judy sum ráðgeva, skrivara og partnara á so mongum økjum í arbeiðnum.

Judy og Óli eiga tveir synir. Dan (1969) er giftur Christy, sum er ættað úr Alabama, og tey eiga fimm børn. Dan arbeiðir nú í kristiligari tænastu í Alabama. Donny (1973) er giftur Helenu, og tey eiga trý børn. Tey búgva í Wisconsin, og Donny arbeiðir sum leiðandi byggifrøðingur.

Í januar 1970 kom Judy saman við manninum fyrstu ferð til Føroya. Ørindini vóru at siga verfaðirinum, sum 55 ára gamal var komin til tað síðsta, farvæl. Vetrarveðrið var buldraligt, og tey vóru veðurføst í Íslandi, og ferðaðust í kavaódn yvir dalar og fjøll og ígjøgnum líðir og yvir sund og firðir, áðrenn tey komu til Klaksvíkar.

Hóast óvon við umstøðurnar á so mangan hátt, so tók Judy Føroyar og føroyingar at sær. Vermamman dugdi ikki eingilskt, og so fór Judy at læra seg føroyska málið. Tað megnar hon so mikið væl, at hon ikki ber seg undan at stíga fram í mannfjøld og tosa á føroyskum. Hon hevur gjørt føroyskar siðir og mentan á so mongum økjum til part av sær sjálvari.

Tá ið hon samstundis dugir væl at hitta og fara við fólki – eldri og yngri – er tað einki at siga til, at Judy eigur nógvar vinir kring alt landið.

Seinni í heyst fara Judy og Óli at vitja í Føroyum. Tey ferðast nógv, og nú lagaði tað seg soleiðis, at tey halda runda føðingardagin hjá Judy í Danmark. Vit eru mong, sum senda føðingardagsbarninum tær hjartaligastu føðingardagsheilsur. Teldupostadressan hjá teimum er oli_jacobsen@ntm.org.

**Jóannes Hansen**




## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu og sera stórt hjálpsemi, tá ið mamma, omma, langomma og vermamma okkara

**Lisa Dam**

doyði og varð jarðað.

*Familjunnar vegna*
**Maud, Arndis, Eydna og Jónhild**